Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum
(Heimild at býta upp embætisuppgávur millum próstar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 60 frá 7. juni 2007 um fólkakirkjuna í Føroyum verður aftan á § 5 sett:

"**§ 5 a.** Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar gera av, at tveir próstar skulu vera í sama próstadømi. Landsstýrismaðurin lutar tá, eftir tilmæli biskups, embætisskyldurnar próstanna millum og ger av, hvør teirra er limur í Próstadømisráðnum."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 9. mai 2023 við 29-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 10. mai 2023

stjóri

LM-087/2022